Frá sorinskrivara til brennivínsmann

AVTIGNA‹UR Sorinskrivarin í Barbu er fallin til drukk í aktuellum filmi, sum vinnur hjørtu á norrønari filmstevnu í Lübeck

Birgir Kruse

Á árligu filmstevnuni í Lübeck, Nordische Filmtage, hevur danski filmurin "Bænken" vunni› fyrstu vir›isløn. Hetta er fyrsti filmur hjá danska leikstjóranum Per Fly. Men fyrsta plássi› er deilt vi› norska filmin "Aberdeen", sum Hans Petter Moland hevur leikstjórna›. Í dómsnevndini sita Katrin Ottarsdóttir og f‡ra onnur fólk, i› øll burturav arbei›a vi› filmi.

Stevnan í gamla Hansasta›num Lübeck s‡nir n‡ggjan norrønan film á hvørjum ári. Og ta› hava tey gjørt vi› t‡skum nærlagni í samfull 42 ár. Dagarnir fella altí› á fyrsta vikuskifti í november. Einasta árliga norrøna filmstevnan er sostatt uttanfyri Nor›anlond.

Dómsnevndin brúkar or›i› "intensitetur" í bá›um førum, tá um vinnararnar ræ›ur. Bæ›i danski filmurin "Bænken" og hin norski "Aberdeen" vi›gera líknandi evni, men á ógvuliga ymiskan hátt. Dómsnevndin sigur, at intensi filmurin "Bænken", sum er fyrsta avrik leikstjórans, brúkar ein nærum dokumentariskan autentisitet og ein ávísan grovleika, vi› einum framúrskarandi høvu›spersóni og einum framúr leikarahópi. Høvu›spersónurin er Jesper Christensen, vit kenna sum sorinskrivaran úr "Barbu". Um norska filmin "Aberdeen" sigur dómsnevndin, at hetta er eisini ein hugtakandi filmur, eftir sum hann er so intensur og hevur so forvitnisligar leikarar. Hesin filmur vinnur vi› at vera væl og stramt skipa›ur og at n‡ta stóra lørifti á ein livandi hátt. Fyrsta filmsvir›irslønin á norrønu filmstevnuni í Lübeck er 25.000 DM.

Svenskir filmar vunnu tríggjar av hinum vir›islønunum. Sonevndu Baltisku Vir›islønina fekk Liv Ullmann, sum hóast fødd í Tokyo av norskum foreldrum luttók vi› svenska filminum "Trolösa", sum byggir á handrit eftir Ingmar Bergman. Hesin filmur var tættasti kappingarneyti, tá "Dancer in the Dark" fekk gullvir›islønina í Cannes í summar. Hinir bá›ir svensku filmarnir, sum vór›u vir›isløntir í Lübeck eru bá›ir barnafilmar: "En god sommar" eftir Ulf Malmros og "En häxa i familjen" eftir Harald Hamrell.



Me›an ta› á okkara lei›um hevur ver›i hildi› líti› sømuligt fyri kirkjufólk at ganga í biograf, ver›ur hetta vir›islønt í kirkjuligum høpi í ø›rum, serliga katólskum, londum. Í Lübeck ver›ur handa› ein sonevnd kirkjulig vir›isløn fyri film. Í ár fór henda vir›isløn til íslendska filmin "101 Reykjavík", vi› hesi grundgeving: "Í sannførandi myndum heldur leikstjórin Baltasar Kormákur stórbæru íslendsku náttúruna upp í móti smáborgarligum medmenniskjansligum ásetingum í b‡num. Hesin filmur tekur upp spurningar, ungfólk seta sær sjálvum. Og vi› tí ertandi skemti, sum liggur í filminum, ver›a vit loyst frá einum moraliserandi lívssjónarmi›i". Í dómsnevndini, sum lata kirkjuligu filmsvir›islønina í Lübeck í ár sita Rita Weinert, bla›kvinna í Hamburg, Anita Uzulniece filmslærari í Riga og Raymond Olsen sóknarprestur í Hjørring. Vi› kirkjuliga vi›urkenningini fylgja tveytúsund markar.

Í 1989 skipa›i Filmsfelagi› og Nor›urlandahúsi› fyri norrønari filmstevnu í Føroyum. Filmar vór›u s‡ndir í Nor›urlandahúsinum og í Útvarpshøllini, har ein danskur fer›abiografur hev›i sett upp. Ta› var til hetta høvi, at fyrsti biograffilmurin hjá Katrini Ottarsdóttir "Atlantic Rhapsody" var› frums‡ndur m.a. fyri altjó›a pressu. Derek Malcolm frá The Guardian dámdi væl filmin og nevndi Woody Allen, sum eitt navn, i› kom honum til hugs vi› hetta høvi.

Í fjør vann n‡ggjasti filmurin hjá Katrin "Bye bye bluebird" fyrstu vir›isløn á norrønu filmstevnuni í Lübeck. Tí sat hon í dómsnevdini í ár.

TELDUPOSTURIN

From: Jógvan Hugo Gardar, Oslo
Reply to: hugoga@online.no
To: <post@sosialurin.fo>
Subject: Teldubrævið 11. november 2000

Eini vandleys rá›, Bless!

– sigur tann fryntliga flogternan, tá vit stíga av Icelandair-flogfarinum á Leivi Hepna flogvøllinum í Keflavík. Vit eru komin beinlei›is úr Noregi uttan nakra millumlending. Í fer›alagnum eru bla›fólk, politikkarar, tænastufólk og onnur. Tey flestu av okkum hava onkrar uppgávur kn‡ttar at nor›urlandará›sfundinum, sum hevur veri› í Reykjavík hesa vikuna. Í fer›alagnum eru óvanliga nógv norsk tí›indafólk. Eitt sindur løgi› havandi í huga, at nor›urlendska samstarvi› ikki er ta›, tey vanliga brúka nógva tí› uppá. Men orsøkin man ikki vera, at tey brádliga hava fingi› ein nor›urlendskan anda yvir seg. Bæ›i forsætisrá›harri, Jens Stoltenberg, og uttanríkisrá›harri Noregs, Thorbjørn Jagland, eru á veg til Reykjavík.

Dagin eftir nor›urlandará›sfundin byrjar landsfundurin hjá norska javna›arflokkinum - ein fundur, sum kann gerast tann mest spennandi í nógv ár. Norsku fjølmi›larnir brúktu fleiri 100.000 krónur til at senda tí›indafólk aftaná Stoltenberg og Jagland. Teir bá›ir vóru í Reykjavík í gó›ar 24 tímar - og tí›indafólkini fingu eingi skelkandi tí›indi frá teimum. Í umlei› 50 ár hevur Nor›urlandará›i› virka› fyri at skipa nor›urlendska samstarvi›. Vit hava fingi› eitt samstarv, sum tey flestu av okkum ikki hugsa um í gerandisdegnum. Nógv av tí, vit taka sum eina sjálvfylgju, byggir á felags nor›urlendskar avtalur, sum nor›urlandará›i› hevur samtykt og lati› upp í hendurnar á teimum tjó›arligu myndugleikunum at føra út í lívi›. Vit kunnu nevna passfrælsi, møguleikan at lesa har vit vilja í ø›rum nor›anlondum og møguleikan at fáa okkum eitt starv í einum ø›rum nor›anlandi uttan at noy›ast at søkja tjó›arligar myndugleikar um uppihaldsloyvi, arbei›sloyvi› ella lestrarloyvi.

Vit taka ta› nor›urlendska samstarvi› sum eina sjálvfylgju, og fyri nógvar av luttakarunum á nor›urlandará›sfundunum, so skal hetta rá› vera ein »kaffiklubbur«. Vit skulu vísa, at vit eru vinir og at okkum dámar hvør annan, og vit mugu fyri alt í heiminum ikki tosa um vi›urskifti, sum vísa á øki, har ikki øll eru samd um eina felags loysn. Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri vi›urskifti, sum eru innanh‡sis í nor›urlendska samstarvinum. Ikki skal tosast um ósemjur millum lond ella partar av nor›anlondum. Ta› er strangliga banna›, og einstakir politikkarar eru skjótir uppá talarastólin, tá politikkarar úr ø›rum londum vísa á ósemjur millum tvær a›rar nor›urlendskar tjó›ir. Sami peikifingur er ikki á lofti tá nor›urlandará›i› brúkar tímar uppá or›askifti um ES, Eystureuropa ella serliga baltalond.

Á fundinum í Reykjavík blivu fleiri tímar brúktir til at hava eitt or›askifti um, hvørt baltalondini skulu gerast limir í nor›urlandará›num, hóast einki av teimum trimum baltalondunum hava søkt ella víst áhuga í at gerast limir í nor›urlandará›num. Men tá ein íslendskur politikkari hættir sær at spyrja danska forsætisrá›harran um, hví Føroyar ikki vóru nevndar í hansara rø›u, svara›i ikki umbo› fyri stjórnina - nei tá fór eitt føroyskt umbo› upp og vísti á, at slíkt ikki hoyrir heima í nor›urlandará›num. Havandi hendan hugbur›in í huganum er ta› als ikki løgi› at nor›urlendsk tí›indafólk halda hesar fundirnar vera einkisigandi.

Frammanundan fundinum hev›i bert ein danskur fjølmi›il givi› bo› um, at tey komu. Ta› var Stockholm-bla›fólki› hjá Jyllands-Posten. Úr Svøríki kom eisini bert eitt umbo›, ta› var fyri Dagens Nyheter. Finnar høvdu sent ein heilan her› - men so er Finland eisini formansland í nor›urlandarádnum komandi ári›.

Fjøldin av norskum tí›indafólkum sum komu úr Noregi brúkti ikki tí› uppá nor›urlandará›i›. Tey skriva›u um norskan politikk og vitjan Jens Stoltenbergs á deCode. Nor›urlendskur politikkur er taparin - og serliga gongur hetta útyvir Útnor›ursamstarvi og londini í útnor›uri, sum framvegis ikki vera nevnd av ø›rum enn íslendarum, grønlandarum og føroyingum. Gongdin er vandafull, um ikki nor›urlandará›i› í størri mun vísir egnum limalondum líka stóran áhuga sum Brussel, Baltalond og Eystureuuropa. Kanska tí›indafólkini høvdu skriva› um nor›urlandará›i›, um ikki politikkararnir eru so bebbaræddir fyri at nerta vi› innanh‡sis ósemjur. Sum er heldur kaffiklubburin fram í einum vandaleysum rá›i.

SÝNSMAÐUR TIL
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Søkt verður eftir sýnsmanni at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávan hjá sýnsmanninum verður at sýna skaðar á bygningar og leysafæ. Eisini fevnir arbeiðið um virðismetingar og váðametingar. Arbeiðsstaðurin er í Tórshavn.

Ynskiligt er, at tú hevur útbúgving sum bygningshandverkari og byggifrøðingur ella líknandi, og at tú hevur praktiskar royndir innan hesi øki. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur telduførleika á brúkarastøði.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og at tú ert fyrikomandi.

Vit bjóða eitt áhugavert starv við góðum arbeiðsumstøðum, og vænta at tú tekur útbúgving innan trygging.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Emil Simonsen, á telefon 345740 ella 217823.

Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 21. november 2000.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
The Faroe Insurance Company
Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

Fulltrúi

Eitt starv sum fulltrúi í Vinnumálastýrinum er leyst at søkja

Høvuðsuppgávur: Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

Krøv til starvið: Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving sum cand. jur. ella líknandi, og at tú hevur góðan kunnleika til edv. Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunnu bjóða: Starvið, sum til tíðir er strævið, er samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit kunnu bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Setanartreytir: Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:

Vinnumálastýrið
Postrúm 377
110 Tórshavn

Freist: Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. november 2000. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen, tel 356060.

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð



GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

Halt **sosialin**

JÓLAKORT

Kom inn og fá tikið eina fitta mynd í hugnaligum jólaumhvørvi

10 jólakort v/brævbjálva
Fotografering íroknað.................... 119,-
Fylgjandi jólakort, kr. 9,- fyri hvørt

Eftir egnum negativi
10 jólakort v/brævbjálva........................ 89,-

Fotodeildin, tel 35 35 34
SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

3arin